## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Rúni Hansen á Grafiska háskúlan



Sum tann fyrsti føroyingurin nakrantíð er Rúni Hansen úr Havn komin inn á kreativu linjuna á Grafiska háskúlanum í Keypmannahavn. Linjan eitur Grafisk kommunikatión.

Rúni Hansen er 30 ára gamal og hevur arbeitt sum teknari hjá samskiftisvirkinum Sansum í sjey ár.

Tað er sera torført at sleppa inna á Grafiska háskúlan. Av teimum 300, sum søktu í ár, komu einans 30 gjøgnum nálareygað. Rúni var til upptøkuroynd í tríggjar dagar, har hann hvønn dag skuldi loysa eina grafiska uppgávu innan fyri seks tímar.

Útbúgvingin til "professions bachelor í grafisk kommunikation" tekur trý ár. Útbúgvingin ger teg føran fyri at skapa grafiska kommunikatión í bæði prentaðum og elektroniskum miðlum. Útbúgvingin inniheldur trý fakøki, sum tilsamans skulu menna tíni evni at skapa samanhang millum hugskot, snið, samskifti og framleiðslu.

### Dagurin

**2. september. Elisa**, profeturin sum kongabøkurnar í Gamla testamenti vita at greiða frá. Í gomlum álmanakkum var navnið skrivað Eliseus, sum kemur av latínska bíbliutýðingini Vulgata

Eliseus hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum.

Navnið merkir *Guð hevur hjálpt*, ella *Jahve er Guð mín.*




*Hósdagin 1. september læt nýggi handilin Exit upp í SMS. Á myndini er f.v.: Lars Müller, eigari, Hanna Mohr Müller, dagligur leiðari, og Ingun Johansen, starvsfólk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Exit í SMS

Hósdagin 1. september kl. 10 læt nýggi handilin Exit upp í SMS við stórum úrvali av klæðum og útgerð til børn og ung frá 0 til 16 ár.

Tað er Lars Müller, sum eisini eigur handilin Skálk, sum eigur Exit, ið er har sum handilin Benneton fyrr helt til. Gólvvíddin er 180 fermetrar.

Lars Müller sigur, at Exit er eitt av konseptunum hjá Bestseller, og handilin í SMS selur vørurnarnar til somu prísir sum í Danmark. Exit handlar eru um alt Evropa.

Í handlinum starvast fýra fólk, og Hanna Mohr Müller er dagligur leiðari í handlinum.

# Fótbóltur á føðingardegnum

*Fremsta rað frá vinstru: Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, Jógvan Petersen, hotelstjóri, Magni Jacobsen, málarameistari og Odd Færø, telduráðgevi. Aftara rað frá vinstru: Hugo Thomsen, bókhaldari, Jóhan Páll Joensen, stjóri, Ragnar Olsen, bilstjóri og Jógvan Høj, stjóri.*

*Mynd: Dávur Winther*



**Í meira enn 20 ár hava nakrir mans í Klaksvík spælt fótbólt í KÍ-høllini týsmorgun klokkan hálvgum sjey**

Soleiðs var eisini týsdagin í hesi vikuni, men tá var ein rundur føðingardagur á skránni. Johan Páll Joensen, vinnulívsmaður og nevndarformaður í Føroya Banka, fylti 50 hendan dagin, og hóast talan var um ein rundan dag, so skuldi fótbólturin ikki forsømast.

Aðrir á liðnum hava eisini fylt nú um dagarnar. Hugo Thomsen gjørdist 49 týsdagin, og síðsta leygardag fylti Jógvan Høj 50.

Onkur helt fyri, at talan má vera um eitt miðaldrandi lið av fótbóltsspælarum.